

# Málsviðgeri í skúlamálum

Av tí at ein av okkara málsviðgerum er farin í annað spennandi starv, verður søkt eftir dugnaligum málsviðgera at umsita m.a. skúlamál.

Tórshavnar kommuna er virkin og fjølbroytt á skúlaøkinum. Vit sóknast eftir einum fólki, sum hevur hug og áræði at ganga á odda at tryggja, at námsfrøðiliga innihaldið í kommunalu skúlabygningunum er á høgum stigi. Kommunan arbeiðir í løtuni við eini heildarætlan fyri skúlaøkið, sum fevnir um fólkaskúlan, musikkskúlan og kvøldskúlan. Partur av arbeiðsuppgávuni verður at samskipa hetta arbeiðið og tryggja gott arbeiðslag við fakfólk og brúkarar.

## Mentamáladeildin

er deild undir trivnaðarfyrisitingini. Deildin umsitur tann partin av føroyska skúlaøkinum, ið við lógum um fólkaskúla, frítíðarundirvísing o.a. er skipaður hjá kommununum. Til deildina hoyra: Fólkaskúlarnir, musikkskúlin, kvøldskúlin, býarbókasavnið, býarsavnið, svimjihøllin og stadionøkið.

## Kommunan bjóðar

eitt áhugavert starv við fjølbroyttum uppgávum, har tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning.

## Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:

- at luttaka í og standa fyri verkætlanum á skúlaøkinum og gera útgreinandi arbeiði í hesum sambandi
- at samskifta við skúlar, stovnar, feløg og einstaklingar, sum virka á mentamálaøkinum
- at vegleiða og ráðgeva leiðslu og politiska myndugleikanum í spurningum á skúla- og mentamálaøkinum

## Førleikakrøv

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og kunnleika til økið.

Umsøkjari skal duga føroyskt og enskt og hava kunnleika til teldu á brúkarastigi.

Kunnleiki til fyrisitingarrætt er ein fyrimunur, men eingin treyt, tí at kommunan skipar støðugt fyri skeiðum fyri starvsfólki á hesum øki.

## Persónligir eginleikar

Umráðandi er, at umsøkjarin er áhugaður í mentamálaøkinum, er fyrikomandi og dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis. Viðkomandi skal duga at leggja til rættis og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

## Setanarviðurskifti

Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

## Meira fæst at vita

um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, deildarleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, telefon 30 20 10.

## Umsóknir

saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. mai 2008.

Tórshavnar kommuna



Vit hava eisini fingið nógvar nýggjar GPS'arar heim, so sum TomTom, Pioneer, Amitech og Sony **Prísir úr 1.990,-**

Góðska fyri lágprís

Pioneer



**PIONEER bilstereo**
DEH-4000UB
- Mosfet 50W x 4
- Radio/CD/MP3/WMA
- USB inngang á frontinum
- SUB útgang

Einans **1.680,-**



**PIONEER bilstereo**
DEH-P65BT
- Mosfet 50W x 4
- Radio/CD/MP3/WMA
- Bluetooth (Tilset telefon, og tosa við fríðum hondum)
- Vel millum 10 litir á skerminum
- SUB útgang

Einans **3.290,-**



**PIONEER bilstereo**
DEH-P85BT
- Mosfet 50W x 4
- Radio/CD/MP3/WMA
- Bluetooth (Tilset telefon, og tosa við fríðum hondum)
- Klárt at seta iPOD til
- 3D skermur
- SUB útgang

Einans **4.490,-**



**PIONEER forsterkari**
GM-5300T
- 2 x 250W ella 1 x 760W

Einans **1.890,-**



Demo model
SPAR 6.691,-

**PIONEER navigatión/DVD**
AVIC-X1BT
- Navigation
- DVD avspælara
- Bluetooth ( Tilset telefon, og tosa við fríðum hondum )
- Møguleika at kobla bakki camera til

Einans **10.845,-**



**PIONEER sub**
AVIC-X1BT
- 150W Innbygdan forsterkara
- Ljóðar sera gott

Einans **2.245,-**

**SP/F Radiobúðin**
Heiðavegur 52 · Box 65
600 Runavík · Tlf 44 80 00